## Undir einum lítlum træi, liggur... ein bókapakki!

*Allarbesta jólagávan er hørð og fýrakantað og keypt í bókabúðini. Sosialurin viðmælir nýggjar føroyskar bókaútgávur í hvørjum blað í jólamánaðinum.*

**Tá Jesus gjørdi nekaran hvítan:**

*Ein meiningsfullur maður*




Í meira enn tvey áratíggju hevur Sjúrður Skaale verið virkin í samfelagskjakinum. Í talum og greinum hevur hann viðgjørt almenn og persónlig viðurskifti; smámál og stórmál. Viðhvørt hevur hann verið skemtiligur, viðhvørt illur. Viðhvørt sakligur, viðhvørt sarkastiskur. Og viðhvørt er hann farin um mark til tað áleypandi og óreina. Bókin, Tá Jesus gjørdi nekaran hvítan, er savn við tekstum eftir Sjúrð Skaale.

**Vaknandi:**

*Vakrar yrkingar til jóladagarnar*




»Vaknandi« er fjórða yrkingasavnið eftir Sigri Gaini og kanska tað vakrasta. Tekstirnir eru kenslubornir og snúgva seg í høvuðsheitum um kærleika, og hvørja ávirkan hann hevur á frásøgufólkið.

**Til tey smæstu:**

*Stuttligi ælabogin*

Ein litrík smábarnabók í røðini Ótrúligir óvitar. Bókin er ein vøkur pappbók, har ælabogin er skorin niður í ein runding. Barnið fær at hoyra um allar ælabogans litir og sagt verður frá upp á rím.
Bókin er 16 blaðsíður og er ætlað teimum heilt smáu.






**ROYNA**

*– Tað myrka valdið hevur, enn sum fyrr góðar dagar um heimin allan, og vit menniskju mugu royna at stríðast móti hesum myrka valdi, sigur Oddvør Johansen í Havn*

**HETTA ER MÍN JÓLASANGUR**

## Oddvør Johansen:

# Jól hava einglaljóð

### – Ein tann vakrasta jólasálmin haldi eg vera »Jól hava einglaljóð«, sum skaldið Jógvan Nolsøe yrkti, sigur Oddvør Johansen í Havn.

Vit sungu hann sum kórsats í barnakórinum hjá Hans Jákup Højgaard á eini jólakonsert í Sjónleikarhúsinum og dugdu hann sjálvandi uttanat.

Í sálminum er tað eins og málar yrkjarin eina klassiska jólamynd, har tú hoyrir klokkur ringja, har loftið er blátt, og har tað hoyrist sús av veingjum. Farið úr barmi út sótt og sút! Útrópstekin. Hitt myrka vald er svunnið, ja, um ikki annað so fyri eina stokkuta stund – eins og hjá gentuni við svávulpinnunum – tí sanniliga hevur tað myrka valdið, enn sum fyrr góðar dagar um heimin allan, og vit menniskju mugu royna at stríðast móti hesum myrka valdi. Og tá hava vit brúk fyri onkrum at trúgva uppá, onkrum at stiðja okkum til ella lena okkum upp ímóti. Eini »stjørnusól«, sum kann lýsa og vísa og linna neyðina í tí stóra veraldarmyrkrinum.

*»Tú bjart kanst okkum lýsa og vísa á veg, so fram vit vinna sum hinir vísmenn.«*

– Jú, hetta er mín yndisjólasálmur, sigur Oddvør Johansen.

*1. Jól hava einglaljóð,
øll so fró
á mikla hátíðsdegi
við gleði
vit honum prís nú syngja,
ið føddur varð í dag.
Nú jólaklokkur ringja,
gerst barnalundin glað;
djúpt sálarstreingir ljóða
í tøkk til Drottin góða;
Guðs einglar syngja við
himnaboð um frið.*

*2. Heilagu jólanátt
loft var blátt,
tá tók á himnaboga
at loga
ein stjørna bjørt, sum eingin
fyrr makan hevði sæð,
tað hoyrdist sús av veingjum,
eitt fagurt einglalag;
og hirðar undrast sára,
ein lýsti glæman klára
um einglarnar, ið tá,
sungu teimum hjá.*

*3. Farið úr barmi út,
sótt og sút!
Hitt myrka vald er svunnið,
nú runnið
er bjarta lívsins ljósið,
tí frø teg, sál, ver glað!
Í Betlehem, í fjósi,
ein frelsari í dag
er føddur tær at grøða
tey syndasár, ið bløða.
So einglaliðið kvað
við halleluja.*

*4. Signaða stjørnusól,
enn um jól
tú bjart kanst okkum lýsa
og vísa
á veg, so fram vit vinna
sum hinir vísmenn, tá
teir vildu barnið finna,
lat okkum Drottin sjá!
Tá himnaleið er funnin
og lívsins krúna vunnin.
Leið oss við lov og prís
inn í paradís!*

*J. Nolsøe.*